

*Hans Jacob Joensen, bispur, prestvígdi Magnus Brahé Jørgensen*

lívið, sum hann livdi, og eisini tann deyðan, sum hann doyði. Hetta er Guðs gáva til okkara. Tí er ein vón í okkara lívi.

Vit vita tað kanska ikki: Men okkara lív er deytt, men vónir Guðs er yvir tí.

Amen!

**Kirkjubøn:**

Lov og tøkk og allur heiður veri tær, Guði várum, faðir, syni og heilaga anda, sum altíð hevur verið, er og altíð verður ein sannur tríeinigur Guð, hálovaður frá fyrsta upphavi og um allar ævir!

Vit biðja teg, Guð og faðir okkara, ver tú hjá okkum øllum við náði og hjálp og signing tíni. Ver hjá øllum teimum, sum hava tað ringt og eru stødd í neyð, hvar tey eru og hvørji tey eru; gev tú teimum ein lætta frá tær og birt tú eitt ljós fyri teimum! Troysta øll tey, sum sorgarbundin eru; sit hjá øllum, sum sjúk eru; ver faðir at faðir- og móðirleysum; ver verji hjá einkjum og einkjumonnum; ver hjálpin hjá øllum teimum, sum ongan góðan hava og øllum, sum hava mist onkran, sum stóð teimum nær!

Vælsigna og varðveit tú alt kirkjufólk títt víða um heimin. Vælsigna og varðveit tað kirkjufólkið, sum kemur saman her á hesum staði. Vælsigna og varðveit tíni heilagu sakramenti og lat orð títt hava frítt at fara okkara millum, lær okkum at goyma tað í reinum og takksomum hjørtum og lat okkum av tí verða vegleidd, lýst og styrkt fram ígjøgnum lívið, og lat tú náðiljós títt lýsa fyri øllum teimum, sum skulu fara inn á deyðans myrku gøtur!

Halt tú tína góðu sterku hond yvir landi okkara og fólki! Vælsigna tú ein og hvønn í hansara lógliga verki bæði á sjógvi og landi! Ver við øllum landsmonnuum okkara , sum eru burturi í fremmandum londum! Ver við øllum teimum, sum eru á sjónum; ver innan borða hjá teimum, fylg í ferðini við teimum, hvar teir fara, og lat anda tín vera millum teirra, lat teir allar vera í tíni góðu og tryggu varðveitslu!

Lat signing tína vera yvir øllum familjum og heimum okkara!

Gev øllum børnum ein tryggan og góðan uppvøkstur í tínum navni, so tey styrkjast í trúnni á teg, Guð Faðir, og boðskapi tínum. Varða okkum frá øllum illum bæði til likams og sálar; styrk okkum øll í tí góða!

Vælsigna og varðveit alla yvirvøld okkara! Vælsigna og varðveit drotning okkara og alt hús hennara!

Fylg okkum á øllum leiðum okkara; ver við okkum í øllum verkum okkara, so at alt hjá okkum verður halgað og signað av tær, og varðveit okkum øll alla tíð í lívsins samfelagi við teg, so at vit, annaðhvørt vit liva ella doyggja, mega hoyra tær til!

Hoyr okkum í Jesu navni.

Eg takki kirkjuráðunum hjartaliga fyri at hava innstillað og valt meg sum sóknarprest.

Eg takka gomlu starvsfeløgum mínum á Posthúsinum og øllum øðrum fyri at vera her í dag.

*Undrið merkir, at tað ikki er tú, sum umbroytist, hvussu fegin tú enn vildi broyta teg sjálvan, so tilveran smakkar enn betur: tú ert og verður hin sami. Og tilveran og lív títt er eisini hitt sama. Men nú verður tað givið tær sum ein gáva frá Guði ístaðin. Og hetta er Guðs miskunn ímóti tær. Og hon sæst og merkist ikki. Men soleiðis verður tilveran og lívið givið okkum í Jesu orðum, fyri at vit skulu liva lívið, sum tað er, og doyggja deyðan, sum hann er, á jøvnum støði við øll onnur menniskju, sum vit møta, í skuld og lagnu, um fyrigevingina og um vónina.*

